# Heitur málskjútti



*Ein heitur áleypari. Seinastu seks dystirnar hevur Sorin Anghel skotið ikki færri enn ellivu mál*

**Vanliga verður tikið til, at tað er kalt á toppinum. Men á føroyska máltindinum er Sorin Anghel glóðheitur í løtuni**

MÁLSKJÚTTI
*Jákup Mørk*

Hóast tað neyvan heldur verður til heiðursmerki í ár, so stendur EB/Streymur aftur í ár við møguleikanum at eiga besta málskjúttan í landinum. Í fjør var tað Sonni L. Petersen, sum fekk gylta skógvin frá Adidas, og í ár er tað so Sorin Anghel, sum stendur við møguleikanum.

Og skal metast eftir, hvussu formurin hjá ymsu álopsspælarunum er, so er einki at ivast í, at Sorin er tann, sum stendur við besta møguleikanum. Við ellivu málum í seinastu seks dystunum er hann í løtuni gløðandi heitur, og tað er einki undur í, at áskoðararnir á Mølini eru farin at geva honum eyknevnið »Skorin«.

Her er aktuella røðin hjá Sorin:

**21. august**
Sorin eigur tvey av málunum, tá EB/Streymur enn einaferð tekur alt í Klaksvík. Hesa ferð við einum 4-2 sigri.

**27. august**
Mest sum einsamallur er Sorin maður fyri at geva Heine Fernandez sekkin, tá hann skjýtur reint hat-trick í heimadystinum móti HB. Ein dystur, sum EB/Streymur vinnur 4-0.

**11. september**
Sjálvandi er Sorin at finna millum málskjúttarnar, tá EB/Streymur í einum merkisverdum dysti vendir 0-2 til 5-2 í útidystinum móti NSÍ.

**21. september**
Sorin Anghel skjýtur fyrsta málið, tá TB verður sent suður við einum 0-3 tapi í útsetta dystinum á Mølini.

**25. september**
EB/Streymur tapir 1-2 á heimavølli móti B36, men málinum stendur Sorin Anghel kortini fyri, tá hann javnar til 1-1.

**2. oktober**
Sorin Anghel ger reint hat-trick, tá EB/Streymur vinnur 5-1 í Gøtu.

## Mál nummar 400

**Tað mundi ikki vera nakað, sum hann hugsaði stórvegis um, men við málinum til 5-1, skeyt Leif Niclasen mál nummar 400 í Formula-deildini í ár. Tað er samstundis nógv hægsta máltalið, sum vit hava havt í fremstu føroysku fótbóltsrøðini, men tað kemst sjálvandi av, at dystartalið í ár er væl hægri, enn tað vanliga er.**

**-mørk**



*Marni Djurhuus hevði óvandan leiklut í verjuni, men hetta tóktist ikki nerva stórvegis móti GÍ, sum fekk av at vita*
*Mynd: Sofus D. Johannesen*

GÍ-EB/Streymur 1-5 (0-2):

# Stendur einki til í Gøtu

**Illa mannaða EB/Streymur vann ein knúsandi tryggan sigur, tá teir so ruddiliga staðfestu kreppuna, sum GÍ er í**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Lógin hjá Murphy staðfestir, at tað, sum kann ganga galið, gongur galið. Og soleiðis mundu gøtumenn eisini kenna tað, tá teir sunnudagin høvdu vitjan av EB/Streymi.

Talan var annars um ein dyst, sum var ætlaður sum fyrsta stigið í trítrinsrakettini hjá Peturi Mohr og GÍ, nú skútan aftur skuldi fáast á beint. Men longu áðrenn minutt-vísarin í Sarpisgerði var farin um trý, vórðu vónirnar skotnar í senk, at kalla. Ein afturleggin varð fangað í vindinum, sum GÍ hevði undan, og slíkar møguleikar skalt tú ikki geva Sorin Anghel fyri tíðina. Rumenski áleyparin streyk avstað, rundaði málverjan og legði EB/Streym á odda.

### Mistu mótið

Og í veruleikanum megnaði heimaliðið ongan tíð at reisa seg eftir hetta. Hóast EB/Streymur var væl og virðiliga umskipað til dystin, nú hvørki Fróði Clementsen ella Andrzej Pacek vóru tøkir til sessirnar í miðverjuni, so kom nýggja samansetingin við Egili á Bø og Marna Djurhuus ongan tíð undir trýst. Heldur ikki, hóast eisini sentrali miðvøllurin var mest sum nýggjur við Gert Hansen og Bárði Olsen.

Hinvegin megnaðu gestirnir fleiri ferðir at spæla seg niðaneftir, og tó at tað skuldi enn eitt verjumistak til, áðrenn tað stóð 0-2 á talvuni, so var tað ikki meira, enn gestirnir áttu uppiborið.

Eftir steðgin tóktist tað fyri tað mesta snúgva seg um, at GÍ vildi avmarka tapið. Sigurin trúðu teir í øllum førum ikki uppá, og tað verður so fremsta uppgávan hjá Peturi Mohr at syrgja fyri, at tann trúgvin aftur fær gróðrarlíkindi á liðnum. Eisini hóast næsta uppgávan er móti oddaliðnum úr B36. Tí fær GÍ ikki stig í tí dystinum, so detta teir við vissu niður á níggjunda plássið, har avleiðingin er, at sessurin í bestu deildini verður settur upp á spæl yvir tveir dystir móti antin B71 ella B68. Tað er ikki ein støða, sum gøtufólk hava verið von við, síðani liðið í 1979 vann seg upp í fremstu føroysku deildina, men verður ikki annað skinn tikið um bak, so kann tað væl gerast kaldi veruleikin. Ikki minst tá hugt verður at seinasta dystinum, sum er á útivølli móti Skála!

## Málini í Gøtu

**0-1: Sorin Anghel**
GÍ verjan er óskettin, tá lagt verður aftur, og so kann Sorin draga fram við sakarsleysa málverjanum og leggja bóltin í netið.

**0-2: Sorin Anghel**
Hesa ferð fær Sorin bóltin við sær inn um verjuspælara, og tá eingin bakkar upp í at síggja til vandaleysu støðuni, kann rumenin enn einaferð rundað Pól, áðrenn bólturin verður sendir í meskarnar.

**0-3: Sorin Anghel**
Sonni L. Petersen og Sorin spæla seg ígjøgnum verjuna, og tá Sonni so leggur innfyri, kann Sorin staðfesta sína støðu sum fremsti málskjúttin í landinum.

**0-4: Bárður Olsen**
EB/Streymur hevur fríspark miðskeiðis á GÍ-hálvuni, og tá bólturin verður rullaður til Bárð, smekkar hann til. Skotið er hart, men málverjin átti kanska at vart fyri.

**1-4: Sámal Joensen**
Gestirnir fremja kanska nakað óneyðugt brotsspark í horninum av brotsteiginum, og Sámal Joensen er sum vant tryggur úr ellivu metrum.

**1-5: Leif Niclassen**
Aftur er Sorin upp á spæl. Hesa ferð rekur hann seg leysan í vinstra borði, og inni undir málinum skal Leif bara seta innaru síðuna á.

## Fakta um dystin

**GÍ-EB/Streymur 1-5 (0-2)**
**0-1:** Sorin Anghel, 3.
**0-2:** Sorin Anghel, 36.
**0-3:** Sorin Anghel, 61.
**0-4:** Bárður Olsen, 64.
**1-4:** Sámal Joensen (br.), 83.
**1-5:** Leif Niclassen, 85.
**Dómari:** Petur Reinert
**GÍ:** Pól Næss Joensen - Hans Pauli Petersen, Robert Rzeczycki, Sam Jacobsen, Hans Jørgen Djurhuus Jacobsen - Áslakur R. Petersen, Símun Louis Jacobsen, Sámal Joensen, Hanus Jacobsen - Magni Jarnskor - Krzyztof Popczynski
**EB/Streymur:** Rene Tórgarð - Esmar Eiðisgarð, Egil á Bø, Marni Djurhuus, Jóhan á Stongum (Ólavur Poulsen, 65.) - Teitur Joensen (Brian Olsen, 10.), Gert Hansen, Bárður Olsen, Jákup Martin Joensen (Leif Niclassen, 65.) - Sonni L. Petersen, Sorin Anghel
**GK:** Marni Djurhuus, 25.